SJÚKRAHÚS VERKIÐ

**Frágreiðing um sparingar á Landssjúkrahúsinum**

Longu tíðliga í vár vóru ábendingar um, at sparingar fóru at verða kravdar fyri fíggjarárið 2026. Landssjúkrahúsið fór tí, saman við leiðslubólkinum áðrenn summarferiuna, undir eina tilgongd at umrøða møguligar sparingar, um hetta gjørdist veruleiki.

Nú hevur Landssjúkrahúsið fingið boð frá Heilsumálaráðnum um at spara 7,7 mió. kr. í 2026. Hetta merkir, at stovnurin má finna varandi sparingar. Krøvini koma uttaneftir, og tí er endamálið hjá okkum at tryggja, at Landssjúkrahúsið framhaldandi kann reka sítt kjarnuvirksemi við eini lægri játtan.

Í raðfestingini av sparingum heitir Landsstýriskvinnan á sjúkrahúsleiðsluna um, at sjúklingaviðgerðir ella kjarnuvirksemið í Sjúkrahúsverkinum verður rakt minst møguligt, soleiðis at sjúklingarnir verða ávirkaðir sum minst. Hetta merkir, at støð og uppgávur í fyrisitingini og stuðulsfunktiónum standa fremst, tá mett verður um sparingar. Áðrenn mett varð um møguligar uppsagnir, hevur leiðslan gjørt eina gjølla gjøgnumgongd av øllum møguleikum fyri at minka útreiðslurnar á annan hátt. Í fyrstu atløgu vóru hesi tiltøk sett í verk:

- Sparingar í rakstri og keypi
- Tíðaravmarkað størv, sum ganga út
- Setanarsteðgur í størvum, sum ikki eru sett
- Nýggj meting av uppgávubýti og møguleikum fyri flyting innanhýsis
- Natúrlig frágongd (pensión, starvsskifti)

Eftir hesa gjøgnumgongd gjørdist greitt, at sparikrøvini ikki kundu røkkast uttan eisini at minka um starvsfólkahópin. Hetta kemur millum annað av, at frammanundan vórðu framdar sparingar í rakstri og ósett størv niðurløgd sum partur av sparikravinum fyri 2025 á 7,4 mió. kr., har tað eydnaðist at sleppa undan uppsøgnum.

Arbeiðið við at finna sparingar er farið fram stigvíst og í tøttum samstarvi millum leiðsluna, fíggjardeildina, depils- og stápsleiðslu og HR.

Vit hava lagt dent á sakligheit, gjøgnumskygni og fakligar metingar, og allar avgerðir byggja á rímilig atlit til virksemið hjá Landssjúkrahúsinum.

Í arbeiðinum hava vit ikki valt einstøk starvsfólk út, men funktiónir og arbeiðsuppgávur, sum kunnu takast burtur ella minka, uttan at tað ávirkar kjarnuuppgávuna hjá Landssjúkrahúsinum.

Í teimum førum har fleiri starvsfólk hava somu ella líknandi arbeiðsuppgávur, og har ein funktión skuldi minkast ella fara burtur, er gjørd ein faklig og fyrisitingarlig meting av, hvørja uppsøgn stovnurin best kann forsvara. Hendan metingin byggir á fakligar, arbeiðs- og persónligar førleikar við tí í hyggju, at varðveita tey best skikkaðu.

Høvuðsatlitini hava verið at:

- verja sjúklingarnar og kjarnuuppgávuna
- tryggja eina sakliga og ruddiliga tilgongd

Øki har sparingar verða framdar:

| Ítøkiligar sparingar | Sparing 2026 |
|---|---|
| | |
| **Rakstur** | |
| Inntøkur frá útlendingum | 1.200.000 kr. |
| Betran av innkeypsavtalum | 900.000 kr. |
| Rest raðfestingin 1870 sálarhjálp | 757.369 kr. |
| | **2.857.369 kr.** |
| **Størv** | |
| Fíggjar- og kt deild | 1.066.858 kr. |
| Kliniskustápur | 608.707 kr. |
| Tænastudepilin | 1.169.214 kr. |
| | **2.844.779 kr.** |
| **Bráðdepilin** | |
| Sjúkrabilur 2 heldur áfram at vera í tilkall í miðstaðar økinum | 2.000.000 kr. |
| | **2.000.000 kr.** |
| | |
| **Alt í alt** | **7.702.148 kr.** |

Fíggjar- og KT-økið: KT-deildin, KT-trygd, THS-deildin, Fíggjardeildin, verkætlanarfólk Bókhald og Lønardeild (32 starvsfólk).

- Tær ymisku funktiónirnar í Bókhaldinum eru tunt mannaðar, men tó eru altíð tvey starvsfólk, sum røkja hvørja uppgávu. Greitt er at tolling er ein uppgáva, sum verður effektiviserað í sambandi við nýggju goymsluskipanina hjá Landssjúkrahúsinum, og tí fellur økið tolling eisini partvíst burtur í Bókhaldinum. Tí metir leiðslan, nú tá sparast skal, at tað er skilabest at minka tollingina við einum starvsfólki.
- Innan Fíggjarøkið er fíggjarstýringin seinastu árini broytt frá at vera ein einkult manuell rokningarskipan, til at vit nú fáa fýra stórar rokningar um árið frá størsta kreditorinum, sum er Región H. Región H. hevur ment eina avrokningardatabasu, har møguleiki er fyri at sláa einkultu sjúklingarnar upp, sum tískil hevur gjørt tað munandi lættari at gera mánaðarligar uppfylgingar, og tíðarsparingin er stór hjá viðkomandi fíggjarfulltrúa. Av hesum orsøkum ber til at minka brøkin hjá tí fíggjarfulltrúa funktiónini, sum hevur við figgjarstýringina av uttanlandsøkinum v.m. um hendi við brøki 0,2.

- Mett er, at eitt starvsfólk kann sparast burtur á KT-deildini. Metingin varð gjørd útfrá, at fýra røkja funktiónina á KT skivuni, har mett verður nú at trý fólk megna at røkja uppgávuna. Avgerðin er tikin útfrá, at tað liggur best fyri á hesum økinum á KT-deildini í mun til hini økini, tí fleiri røkja somu uppgávu og kunnu fáa stuðul frá 2nd level í spídsbelastningstíðum.

Kliniskur stápur: Uttanlandstænastan, Sjúklingahotellið og Dygd & Betran.

- Í Uttanlandstænastuni er gongd í at seta eina nýggja skipan í verk, sum væntandi fer at effektivisera arbeiðið soleiðis, at eitt starv kann niðurleggjast. Sjúklingasamskipararnir sita allir við somu uppgávum, og tí eru uppgávurnar í samskiparabólkinum ikki so tengdar at hvørjum starvsfólki sær. Av tí at eitt starvsfólk á brøk 0,8 júst hevur sagt seg úr starvið, er bert neyðugt at niðurleggja 0,2 í hesi funktiónini.

Tænastudepilin: Tænastudeildin, Køkur, Tekniska deild, Medico teknisk deild og Vaskaríið.

- Eitt starv verður niðurlagt, har viðkomandi longu er farin úr starvinum í mars, og uppgávurnar eru deildar út á fleiri starvsfólk.
- Leiðslan hevur mett, at eitt starv sum snikkari á Teknisku deild er gott fyri tænastustøðið á Landssjúkrahúsinum, men hevur ikki ávirkan á klinikkina og trygdina í sama hátt sum hinar funktiónirnar á Teknisku deild, og verður tí spart burtur.

Vit á Landssjúkrahúsinum standa í eini truplari støðu, har tað er neyðugt at laga raksturin til eitt minni fíggjarligt rásarúm.

Tað er altíð tungt, tá avgerðir fáa ávirkan á starvsfólk, og vit hava verið greið um, at hesar avgerðir skulu takast við størsta álvara, virðing og fakligheit.

Leiðslan hevur gjørt sítt fyri at tryggja, at allar avgerðir eru grundaðar á fakligar metingar, gjøgnumskygni og rættvís atlit.

Vit vita, at hesar avgerðir raka bæði menniskjaliga og fakliga, og vit vísa virðing fyri teimum, sum verða rakt av broytingunum.

Vinarliga

Leiðslan á Landssjúkrahúsinum


J.C. Svabos gøta 41-49
FO-100 Tórshavn
Tel. +298 30 45 00
ls@ls.fo
ls.fo